# Føroyingar í Grønlandi á Rásini

Nú jólini nærkast fer Rás2 eisini at seta sín serstaka dám á jólini. Og eingi jól uttan jólamannin. Men vita vit, hvaðani jólamaðurin kemur! Svarið fáa lurtararnir hjá Rás2 í jólasendingini leygardagin. Frá klokkan 13 til 19 hevur Rásin samrøður og tónleik, sum snúgva seg um jólini. Farið verður so eisini til Grønlands, haðani jólamaðurin kemur. Grønland er landið hjá jólamanninum. Tað fer føroyska Theresa Kreutzmann at greiða okkum frá. Hon er leiðari á ferðaskrivstovuni í Nuuk, sum eisini hýsir kontórið hjá jólamanninum. Klokkan 17.15 leygardagin er samrøða, sum Jan Müller hevur gjørt við hana, nú hann vitjaði í Grønlandi herfyri og vildi hoyra sannleikan um jólamannin, sum grønlendingar hava tikið sær patent uppá. Børn kring allan heim senda í hesum døgum brøv til jólamansins kontór í Nuuk. Hesi enda øll í tí risastóra postkassanum.




***Havnarmaðurin Kristian Dahl til arbeiðis í Nuuk***
*Mynd Jan Müller*

Á ferð síni í Nuuk vitjar Jan Müller eisini á politistøðini, har hann hittir føroyska løgreglumannin Kristian Dahl, sum hevur valt at taka umleið eitt ár úr føroyska arbeiðskalendaranum og heldur arbeiða í Nuuk. Henda samrøðan verður at hoyra í morgunsendingini á Rás2 mánadagin klokkan 10.10.

Samrøðurnar við tey bæði verða eisini at lesa í Sosialinum í næstum.




***Føroyska Theresa Kreutzmann her við heimsins størsta postkassa í Nuuk.***
*Mynd Jan Müller*





# Ráðgevi til Vinnuhúsið

Vil tú vera við til at bera verandi vinnu framá? Megnar tú at fara í dýbdina og at arbeiða breitt? Klárar tú at hava fleiri bóltar í luftini í senn og halda høvdið kalt? So er eitt spennandi starv at søkja í Vinnuhúsinum!

Nú ein av okkara ráðgevum hevur tikið við aðrari avbjóðing, søkir Føroya Arbeiðsgevarafelag eftir ráðgeva til Vinnuhúsið. Ráðgevin skal samskipa og ráðgeva vinnugreinafeløgum, m.a. Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Ráfiskakeyparafelag.

Arbeiðið fevnir um at

- samskipa uppgávur fyri nevndir í nevndu vinnugreinafeløgum
- lýsa mál og gera frágreiðingar
- viðgera lógir og kunngerðir
- luttaka í arbeiðsbólkum og nevndum
- vera við í fyriskipan av vinnuligum tiltøkum og átøkum

Í hesum sambandi krevst tætt samskifti við leikarar í føroysku vinnuni og við myndugleikar.

Vit vænta, at tú

- hevur hóskandi hægri útbúgving og arbeiðsroyndir
- hevur kunnleika til føroyska vinnu og umsiting
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- hevur góð samstarvsevni
- dugir væl at samskifta, bæði á føroyskum, norðurlendskum og enskum

Vit kunnu lova tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv í einum mennandi arbeiðsumhvørvi.

Løn eftir avtalu.

Skrivlig umsókn, merkt "Starv", eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. januar 2011.

Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til stjóran, Maritu Rasmussen, tel. 30 99 00.

Føroya Arbeiðsgevarafelag
Vinnuhúsið
Postsmoga 1038, FO-110 Tórshavn

sansir.fo

Vinnuhúsið er felags heiti fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag við undirfeløgum umframt føroysku vinnufeløgini.
Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møguligu kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og við kunning, sum gevur politiska ávirkan.
Feløgini taka sær m.a. av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum, sí eisini www.industry.fo.

Smærugøta 9A // FO-100 Tórshavn // Tel: +298 30 99 00 // Fax: +298 30 99 01 // industry@industry.fo

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY